GERÐABÓK

Dato: 12. oktober 2026 **Kl**. 16:30
Stað: Býráðssalinum
Málsnr: 269/26

FUNDARLEIÐARI:
Elsa Berg

VIÐ LUTTØKU AV:
Heðin Mortensen
Heidi Lava Elgeirsdóttir
Annita á Fríðriksmørk
Anja Weyhe
Kristianna Winther Poulsen
Bergur Robert Dam Jensen
Guttormur í Skála
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Høgni Vilhelmsen
Birgir Nielsen

LUTTÓKU EISINI:
David Andresen
Øssur Patursson

LUTTÓKU IKKI:

SKRIVARI:
Jóan Petur Hentze

PROTOKOLLFØRARI:
Olga Knudsen

Innihaldsyvirlit **Síða**

Til viðgerðar

269/26	26/07820-1	LM-033/2026 : Uppskot til løgtingslóg um havnargjald, brúgvagjald og vørugjald (fylgilóg til FLU 27)	1034

Til viðgerðar

269/26 LM-033/2026 : Uppskot til løgtingslóg um havnargjald, brúgvagjald og vørugjald (fylgilóg til FLU 27)

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Havnanevndin	12.10.2026	47/26	26/07820-1
2 Býráðsfundur	12.10.2026	269/26	26/07820-1

Upprunin til málið
Uppskot til løgtingslóg um havnargjald, brúgvagjald og vørugjald, ið landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur lagt fyri løgtingið hin 30.september.

Lýsing av málinum
Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur hin 30. september 2026 lagt uppskot til løgtingslóg um havnargjald, brúgvagjald og vørugjald fyri løgtingið. Málið stendur á skrá til tingfunfin hin 20.oktober.

Lógaruppskotið frítekur skip hjá Strandfaraskipum Landsins, verjuskip, vaktar- og bjargingarskip og havrannsóknarskip, sum landið eigur, frá at rinda havnargjald, brúgvagjald og vørugjald til kommunalar havnir. Sambært lógaruppskotinum kemur lógin í gildi 1. januar 2027.

Tórshavnar havn og Strandfaraskip Landsins gjørdu í 2005 eina skrivliga avtalu um vøru- og skipagjøld fyri skip í innanlands sigling. Sambært hesi avtaluni fær Tórshavnar havn í dag uml. 7 mió kr um árið í havna-, brúgva- og vørugjøldu frá skipum hjá Strandfaraskipum Landsins (gjøldini verða prístalsreguleraði).

Verður uppskotið samtykt, missir Tórshavnar havn sostatt umleið 7 mió.kr. í inntøkum um árið.

Lógaruppskotið hevur ikki verið til hoyringar, og eingin fráboðan ella kunning er komin um at hetta lógaruppskotið.

Uppskot til tíðindaskriv er orðað, j.nr. 26/07820-7

Lógir, ásetingar o.a.

Upplýsingar frá umsitingini
Í 2009 legði sami landssýrismaður, sum tá var fiskimálaráðharri, fram nærum einsljóðandi lógaruppskot fyri løgtingið. Tá umfataði lógaruppskotið tó bert havnargjøld, men ikki brúgva- og vørugjøld. Í uppriti til landsstýrisfund lýsti táverandi Innlendismálaráðið uppskoti at vera heft við álvarsligum løgfrøðisligum trupulleikum av stýrrisskipanarrættarligum slag og mátti metast at vera ognartøka sambært grundlógini § 73, umframt á aðrar løgfrøðisligar trupulleikar.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum tók málið aftur, áðrenn málið kom til 1.viðgerð í løgtinginum.

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

	Býráðsfundur 12. oktober 2026	Blað nr.: 1035 Forkvinnunnar merki:

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒

Skjøl
26/07820-2 : Avtala um skipa- og vørugjøld
26/07820-3 : Hagtøl
26/07820-4 : Innlendismálaráðið – upprit til landsstýrisfund
26/07820-5 : LM-033/2026 : Uppskot til løgtingslóg um havnargjald, brúgvagjald og vørugjald
26/07820-6 : Viðmerkingar frá LEKS adv. Til LM-033/2026
26/07820-7 : Tíðindaskriv (uppskot)

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar				

Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei

Tilmæli:
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til, at taka undir við uppskotinum til tíðindaskriv, j.nr. 26/07820-7, og at beina málið í býráðið.

Havnanevndin 12. oktober 2026: Uppskot til tíðindaskriv varð framlagt og góðkend og nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Býráðsfundur 12. oktober 2026: Einmælt samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

FUNDURIN LOKIN KL. 18:10

GERÐABÓKIN GÓÐKEND:

Elsa Berg	Heðin Mortensen	Heidi Lava Elgeirsdóttir
Annita á Fríðriksmørk	Anja Weyhe	Kristianna Winther Poulsen
Bergur Robert Dam Jensen	Guttormur í Skála	Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson	Kári Johansen	Høgni Vilhelmsen
	Birgir Nielsen	